B36-TB 0-0

# TB helt javnleikinum

**Hóast B36 hevði møguleikar, so megnaðu teir ikki at skjóta avgerandi málið. Og í roynd og veru kundi TB eisini farið avstað við øllum, um hepnið var við teimum**




*Serliga fyri steðgin gekk striltið hjá B36-miðvøllinum at fáa nóg nógva ferð á spælið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá B36 í øðrum umfarinum av Formula-deildini vitjaði á Sevmýri, mundu teir kenna seg hepnar, at teir fóru avstað við einum sigri. TB prógvaði í tí dystinum, at teir als ikki ætla sær at vera kanónføði í ár, og sæð burtur frá knúsandi tapinum í Klaksvík, so hevur hetta eisini staðið við.

Hóast gongdin hjá TB seinastu dystirnar hevur verið í tyngra lagi, so hevur verjuparturin framvegis riggað hampuliga væl, og fáur mundi ivast í, at tað var hesin, sum dúvast skuldi uppá sunnudagin, tá vitjað varð í Gundadali.

Og tað var eisini greitt alt fyri eitt, at TB fyrst og fremst vildi binda um heilt. Teir lótu B36 hava bóltin nógv, fyri sjálvir at standa langt afturi á vøllinum í bíðanini eftir kontramøguleikum. Nakað sum tó ikki hendi heilt. Einamest tí B36 fyri steðgin alla tíðina sýndi neyðuga tolið, sum var neyðugt, um teir ikki av skuldu gerast blankir aftanfyri.

Men tað var tunnligt við møguleikum. Heimaliðið megnaði sjáldan at seta ferðina upp, soleiðis at væl skipaða TB-verjan kundi togast sundur, og tá teir loksins sluppu ígjøgnum í síðunum, vóru seinastu sendingarnar als ikki nóg neyvar.

Tað tóktist tó batna hjá heimaliðnum eftir steðgin. Menn tóktust nú taka uppgávuna í størri álvara, og skjótt varð eitt veruligt trýst fingið í lag móti TB-verjuni.

Ikki minst gjørdi tað góðan mun, tá Pól Thorsteinsson varð sendur á vøllin. Hann megnaði veruliga at fáa breidd í spælið, og so líðandi komu møguleikarnir eisini.

Heimaáskoðararnir mundu sita sum á nálum, tá bólturin fleiri ferðir dansaði inni í TB-brotsteiginum, men mest sum hvørja ferð kom ein fótur ella kroppurin á einum tvøramanni fyri, soleiðis at einki spurdist burtur úr royndunum.

Og megnaðu heimamenninir at koma framvið so hevði TB í Predrag Markovic ein málverja, sum væl og virðiliga kann geva starvsfelaganum í hinum endanum kapping, tá tosast skal um besta málverjan í Formula-deildini. Besta dømi um hetta gav Predrag, tá hann í stórum stíli bjargaði einum stútara frá Fróða Benjaminsen, sum annars allur Gundadalur mundi síggja í meskunum.

### Mundu stolið alt

Og móti endanum var eisini um reppið, at TB fór við øllum. Langt útspark frá Predrag endaði onkursvegna við, at tveir TB'arar vóru mest sum leysir, men skotið frá Emmanuel Larby smoygdi sær skeivu megin stólpan.

Og tað vildi næstan verið ov nógv av tí góða hjá B36, um tann bólturin hevði sitið. Í øllum førum mundu teir hvítu, sum sunnudagin spældu í bláu útivallarbúnunum, kenna seg hava stigini uppiborin, men tað munar kortini lítið, tá mál ikki verða skotin.

Tað kostar, tá tú ætlar tær at vera við frammi í oddinum, og nú reyð/svørtu grannarnir eisini eru farnir at vinna á útivølli, merkist stigamissurin eyka væl.

Hjá TB høvdu teir tó alla orsøk at vera nøgdir. Sjálvandi iðraðu teir seg um, at tað ikki eydnaðist at skora, tá møguleiki beyðst, men teir fingu javnleikin, sum komið var eftir. Og kanska mest týðandi, so megnaðu teir nú aftur at halda búrið reint. Næstu ferð skulu teir royna seg á heimavølli móti EB/Streymi, og verður talan tá um trý stig, hevur liðið aftur lyft seg nakað væl úr botninum.

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-TB 0-0**
**Dómari:** Eiler Rasmussen
**B36:** Jákup Mikkelsen - Kenneth Jacobsen, Herbert í Lon Jacobsen, Klæmint Matras, Alex Dos Santos - Fróði Benjaminsen, Ingi Højsted (Bogi Hermansen, 76.), Mikkjal Thomassen (61.: Pól Thorsteinson), Bergur Midjord - Allan Mørkøre, Okeke Obele Onyebuchi (Wellington Silva Soares, 55.)
**GK:** Allan Mørkøre
**TB:** Predrag Markovic - Birgir Rasmussen, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Olivur Abrahamsen (Mortan Enni, 89.), Alexander Jovevic, Bárður Dimon, Einar Petersen - Emmanuel Larby (Allan Poulsen, 90.), Hallur Christiansen (Búi Mortensen, 61.)
**GK:** Predrag Markovic, Aleksandar Jovevic

# Eli og Torkil bestir á Sundalagsstevnuni

**Kappsúkklingin á Sundalagsstevnuni í Hósvík var fríggjakvøldið**



*Tað sá heldur tunnligt út við málið, tá súkklararnir gjørdu seg klárar at fara undir tíðarkoyringina í Hósvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Tað var Tórshavnar Súkklufelga sum skipaði fyri kappingini. Kappast varð bert fyri unglingar og vaksin. Eingin barnasúkkling var, tí mett var at trygdin til barnasúkkling, meðan stevnan var, var ikki nóg góð.

Start og mál var á landsvegnum í Hósvík. Súkklast skuldi úr Hósvík, eftir landsvegnum fram við Streymnesi, um Brúnna við streymin og niðan til rundkoyringina omanfyri Norðskála. Har varð vent og síðan varð súkkla sama veg aftur til Hósvíkar. Teinurin var 23,6 km. langur.

Fyrsti súkklarin byrjaði klokkan 19:00. Síðan vóru hinir sendir avstað við 2 minuttum ímillum hvønn.

Vinnari av kappingini gjørdist tann 20 ára gamli landsliðssúkklarin Eli Christiansen. Hann súkklaði teinin upp á 36 minuttir og 31 sekund. Hetta er ein miðalferð upp á 38,77 km um tíman. Eli er um av vera í toppformi nú, men so vil tíðarsúkkling skal servenjing til. Hana hevur Eli ikki fingist eins nógv við, sum hann hevur vant til langar teinar, sprintir, brekkur o.t. Men álíkavæl kláraði hann at vinna.

Hjá unglignunum vann tann 15 ára gamli Torkil Veyhe úr Havn. Hansara tíð var 40 minuttir og 23 sekund. Miðalferðin hjá Torkil var 35,6 km um tíman. Torkil var bert 1 minutt og 24 sekund frá tíðini hjá einum av landsliðssúkklarunum. Tað er ein sera góð tíð fyri ein 15 ára gamlan.

Av tí at súkkling er ein so hørð ítróttargrein, skulu súkklarar vera 18 ár fyri at vera við á oyggjaleikum. Men til oyggjaleikirnar 2007 verður Torkil umleið 6 mðr. ov ungur, so vil súkklufelagið arbeiða fyri, at hann álíkavæl kann verða við á landsliðnum tá. Sjálvandi skal hann kvalifisera seg, men mett verður, at um hann heldur á fram sum nú, so verður hann helst ein fongur fyri landsliðið og føroyska súkkling.